Fløguummæli

# Fimm fjónaðar í flø




Fløgumarknaðurin hevur í ár veruliga verið floymdur við eini skolu av føroyskum fløgum. Í sjálvum sær er hetta gott tekin, hóast røddir í Føroyum eisini vilja føra fram, at tað keðiliga í Føroyum er, at hvør Hanus og Janus gevur út, hvørt tað so eru bøkur, fløgur ella annað. Tann, ið hevur havt ætlanir um at umrøða allar fløgurnar í ár, hevur í hvussu er ikki verið arbeiðsleysur

**TÓNLEIKUR**
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Her fara vit at taka upp í lógvan úr rúgvuni av fløgum, sum út eru komnar í ár, men sum ikki hava fingið hóskandi umrøðu. Betri seint, enn ongantíð.

Tað er nevniliga so, at so avbera nógv er útkomið - gott og minni gott, at hann, ið ætlaði at standa seg við umrøðum av øllum hesum, lættliga hevur fingið ein trupulleika.

Ætlanin her er so heldur ikki at koma við einum djúpum ummæli av hesum fløgum. Tíðin er runnin undan hesum, og fólk kenna fløgurnar og hava óivað eina meting, men tó hava útgávurnar uppiborið umrøðuna, ið tær ongantíð veruliga fingu. Tó nakrar fingu meir, enn aðrar. Men her verður gjørt ein samanumtøka, innan jólamarknaðarfløgurnar av álvara

**Roknskaparfólk**

TEAM85

Vit leita eftir einum skilafólki til at røkja og skipa roknskaparviðurskifti okkara. Starvið er fulltíðarstarv og verður lønt eftir avtalu.

Bókhaldarin hevur beinleiðis tilvísing til stjóran og hevur ábyrgdina av at dagliga arbeiðið viðvíkjandi bókhaldi og roknskapi verður dagført. Uppgávurnar eru fjølbroyttar og fevna eisini um viðlíkahald og menning av mannagongdum í Auto Service Pf..

Vit ímynda okkum, at tú hevur royndir, ert fyrikomandi og tekur arbeiðið í álvara.

At vera roknskaparfólk hjá okkum er líka so mennandi og spennandi, sum tú gert tað til. Harvið meina vit, at tað hevur alstóran týdning, at tú kanst arbeiða sjálvstøðugt og kanst hava tamarhald á fleiri uppgávum samstundis.

Tú fært rættiligar fríar hendur at laga arbeiðsdagin og mest sannlíkt verður tú ein teirra, ið best veit, hvussu vit hava tað.

Hevur tú spurningar til starvið, ert tú vælkomin at ringja til Árna Rasmussen á tlf. 345 400. Umsóknir, ið skulu verða okkum í hendi innan 1. desember, skulu sendast til:

**Auto Service P/F**
**Árni Rasmussen**
**undir Krákugjógv**
**100 Tórshavn**

Auto Service telist millum størstu bilasølur í landinum og umboðar bilamerkini Peugeot, Nissan, Saab og Opel



undir Krákugjógv tel. 345400 **Auto Service**